

## Áhugaverdar toskaroyndir

Granskarar eru sera spentir upp á nýggjar royndir við at savna undirmáls tosk í botngørnum í donskum og týskum gørnum í vestara parti av Eystursjónum. – Vit eru so vónrík, at vit ætla at halda fram við royndunum. Vit vóna, at víðka um royndirnar, og tí hevði tað komið væl við at fingið fimm garnafiskarar í royndunum, sjálvt um vit miðað móti tíggju. Tað merkir eisini eina góða útbreiðslu av økjunum, so talan ikki bert verður um tað eina økið, sigur Maria Storr-Paulsen frá DTU Aqua, ið er ein av donsku granskarunum í JOIFISH verkætlanini. Tveir danir og tveir týskir botngarnsfiskarar vóru við í royndunum heystið 2008 og skaptu grundarlagið fyri hagtølunum. 39.022 toskar undir 20 sentimetrar vórðu í tíðarskeiðinum heystið 2008 fiskað í botngørnum á 13 ymiskum positiónum við Lolland, Fyn og við Fehmern í Týskalandi. Alt bendir á, at ágrangurin 2008 er størri enn meðal, sigur Marie Storr-Paulsen.

# Heimsins fremsta toska

**Tað er so at siga eingin í øllum heiminum, sum dugir so væl at ala tosk á landi, sum tey hjá Faroe Cod Farm (FCF) í Hvalba. Men alingin er í vanda fyri at fara fyri bakka. Fær FCF ikki nýggjan kapital, fara vit at sita í Føroyum um fimm ár og telja pengarnar hjá norðmonnum og øðrum, sum kunnu byggja víðari á tær royndir, ið føroyingar hava gjørt sær higartil við toska-alingini á landi**

FCF Í HVALBA
*Leif Láadal*

Í Hvalba eiga tey ikki bara nakrar av bestu ísfiskatrolarum í heiminum. Har finst eisini eitt virkið, sum er við á allarfremstu rók, tá tað snýr seg um aling av toski á landi.

- Eigararnir trúgva framvegis upp á prosjektið, men sum tíðirnar eru, er torført at fáa nýggjan kapital til vega, og tí átti tað almanna at komið upp í leikin, so heimsins kanska fremsta toskaaling á landi ikki endar á øðrum enn føroyskum hondum, ella fullkomiliga fer fyri bakka, sigur Richard Rognsoy, sum ikki eftirlýsir nakran kreppustuðul, men heldur einum almennum menningaríkasti, sum hevði gjørt mun.

Í Norra hevur almenni myndugleikin sprænt eina milliard krónur í toskaaling seinnu árini, og tað hevur havt við sær, at normenn eru við heilt frammi, tá tað snýr seg um aling av toski á sjónum. Í Føroyum er toskaalingin á landi í Hvalba við í fremstu røð, og tað sjálvt um almenni kostnaðurin higartil hevur verið ein eyðmjúk hálv millión krónur um árið.

### Heildarætlan

Í løtuni er fyri so vítt einki skil á almenna leiklutinum í tí, sum kann gerast næsta stóra ali-ævintýrið her á landi. Toskaaling á sjónum koyrir sína egnu gongd við útgangsstøði í Árnafirði, toskaalingin á landi í Hvalba steðgar kanska upp um stutta tíð, tí har eru ov fáir pengar, og tá tað snýr seg um lívfiskin á Fiskaaling, eru játtanirnar har eftirhondini so smáar, at tað bara er ráð til halda blussinum á tí lægsta stiginum.

Richard Rognsoy eftirlýsir tí einari heildarætlan. Einari ætlan, sum skal seta út í kortið, hvar føroyingar vilja á toska-alileiðini, hvussu hendan aling skal skipast í mun til spurningar sum "land kontra firðir", "tosk kontra laks og síl", "vinnuframaátøk kontra eginfígging" og mang annað, sum manglar.

Tað hevði verið ynskiligt við einari heildarætlan fyri, hvat vit skulu gera við toskaalingina í Føroyum næstu fimm-seks árini, tí so visti allir partar, hvat teir høvdu at halda seg til, sigur Richard.



*Aldi toskurin í Hvalba kann gerast eitt satt gullnám, um Faroe Cod Farm sleppur víðari, sigur stjórin Richard Rognsoy*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Fremst í heiminum

Toskaalingin á landi í Hvalba er ein av teimum heilt fáu verkætlanum av hesum slagi, sum hevur víst seg at kunna bera seg. Í løtuni er toskurin í Hvalba umleið 1,5 kilo , og arbeitt verður við at fáa hann enn størri.

At ala á landi gevur ein størri tryggleika enn at ala á sjónum, sigur Richard Rognsoy, tí tað er lættari at hava stýr á umhvørvið, har alt verður.

Og tað hevur gingið væl higartil. Sum er, hevur tað eydnast FCF at alt tosk líka bíligt, sum mann alir laks í løtuni.

Áhugin fyri toskaalingini á landi í Hvalba er stórur uttanlands. Serliga hava aðrar norskar fyritøkur ligið framvið.

- Vit liggja inni við eina hollari vitan og góðum royndum, sum tey eru sera áhugað í til dømis Norra, sum er komið styttri enn vit í at ala á landi, og eg havi fingið fyrispurningar frá alarum í Norra, sum vilja sleppa at seta pengar í, ella rætt og slætt vilja sleppa at keypa virkið, taka tað niður og seta tað upp í Norra, sigur Richard Rognsoy.

### Av Føroya Banka

Tað er serligi Føroya Banka-toskurin, sum er grundarstøðið undir føroyskt alda toskinum, og tað er hesin toskur, sum sær út til at sláa allan annan aldan tosk á marknaðinum. Føroya Banka-toskurin veksur skjótari, hann krevur minimalt av ljósi fyri at steðga kynsbúgvinginí - sum mann ger í alingini. Framleiddur í kørum á landi, er toskurin eisini fastari í kjøtinum enn flest allur annar aldur toskur.

Fyri at verja hendan serstaka tosk, og geva føroyingum møguleika at blíva kanska heimsins fremsti toska-alari, mælir Richard Rognsoy til, at ein nevnd verður sett við umboðum fyri almenna myndugleikan, Fiskaaling og toskaalingina her á landi, sum skal gera eina heildarætlan, har pengar fylgja við.

Ein heildarætlan við umleið 40 milliónum krónum, hevði verið nóg mikið beint nú, metir hann. Fyri tann peningin, hevði mann kunnað ment føroyska toska-aling á landi til eina veruliga vinnu við risastórum inntøkumøguleikum.

### Umstøðurnar

Í Hvalba er gott at ala á landi, men fyritøkan FCF treingir eftirhondini til betri umstøður og størri bygningar og kør.

- Mann hevur tosað um ein vinnuframagrunn fyri Suðuroynna í áravís, og slíkur grunnur kundi til dømis stuðlað kommunum í at gjørt byggiklárt hjá teimum fyritøkum, sum vilja í gongd, ella vilja útbyggja, sigur Richard Rognsoy.

Stjórin á FCF hevur kannað umstøðurnar í Norra, og har standa kommunur á høvdinum á hvør aðrari fyri at lokka fyritøkur av hesum slagi til sín. Tær gera tískil alt klárt til bygging, uttan at tað kostar virkinum eitt oyra.

- Eg sigi ikki, at føroyskir myndugleikar skulu gera júst tað sama, sum verður gjørt í Norra, men hetta

> *»Eg havi fingið fyrispurningar frá alarum í Norra, sum vilja sleppa at seta pengar í, ella rætt og slætt vilja sleppa at keypa virkið, taka tað niður og seta tað upp í Norra«*
>
> *Richard Rognsoy, stjóri hjá Faroe Cod Farm*

## Fakta

Ognarviðurskiftini hjá Faroe Cod Farm síggja soleiðis út:

- ECO Farm (NOR): 25,6%
- Tjaldur: 21,3%
- Eik Grunnur: 21,3%
- Steintór: 21.3%
- TF Holding: 10,6%

## Munur á umstøðum

Sjálvt um alingin av toski á landi í Føroyum kanska er tann fremsta í øllum heiminum, so er spurningurin, hvussu leingi hendan støða heldur fram.

Í Norra tveita tey nevniliga pengar í nakkan á toskaalarum. Seinastu tíðina eru 500 milliónir norskar krónur settar av til at menna marine-sektorin, umframt at ein milliard krónur eru brúktar til at menna toskaaling.

Í Føroyum fær Faroe Cod Farm (FCF) í Hvalba 500.000 kr. árliga úr Vinnuframagrunninum, og tað er betri enn einki, men ikki nær í námind einum tali, sum ger veruliga mun, sigur stjórin á Richard Rognsoy.

- Eg sigi ikki, at vit skulu spræna milliardir í føroyska toskaaling, men ein 5-6 ára ætlan fyri økið við eini 40-50 milliónum í einum grunni til endamálið, vildi havt við sær, at Føroyar varðveittu fremstaplássið, tá tað snýr seg um aling á landi, sigur hann.

Í Føroyum er avmarkað við firðum, sum alast kann á, og tí er aling á landi ein góður møguleiki, sigur Richard Rognsoy, stjóri hjá Faroe Cod Farm í Hvalba, sum alir tosk á landi. Hann vísir á, at eitt virkið, sum í dag fæst við aling á sjónum, kann supplera sína laksa- og sílaaling við toski á landi, og á tann hátt slappa undan at velja millum laks og tosk á sjónum.